# Uppskot: Veitarasáttmáli

**millum**
**Gjaldstovuna (Kundin) og**
**sp/f xxxxxx, v-tal xxxxxxx (Veitarin)**

| | |
|---|---|
| **Grundarlag** | Sáttmálin fevnir um uppgávur knýttar at førleikamenning innan verkætlanarleiðslu á Gjaldstovuni.<br>Hesin sáttmálin, saman við útbjóðingartilfarinum, er grundarlagið undir samstarvinum. |
| | Kundin ger sáttmála við veitaran, har tað er <**NAVN Á RÁÐGEVA**> (Veitarin), ið fremur uppgávurnar. |
| **Ábyrgdarhavandi av sáttmálanum** | Nicolai Mohr Balle er ábyrgdarhavandi og leiðari fyri Kundan og xxxxxxx er ábyrgdarhavandi fyri veitaran. |
| **Uppgávur hjá veitaranum (veitingin)** | Talan er um menning av luttakarum í verkætlanararbeiði, verkætlanarleiðslu og sum limi í stýrisbólki, við tí endamáli at:<br>• økja førleikan hjá stovninum at fremja verkætlanir við størri effektiviteti og góðsku<br>• skapa felags mentan, mál, og fatan av verkætlanum<br>• skapa eitt sterkt netverk millum verkætlanarstarvsfólk.<br>Uppgávurnar hjá Veitaranum eru nágreiniligari lýstar í útbjóðingartilfarinum. |
| **Arbeiðstíð og -staður** | Uppgávurnar skulu loysast í vanligari arbeiðstíð, um ikki annað er avtalað.<br>Arbeiðsstaðurin verður á Gjaldstovuni, tá talan er um sjálva undirvísingina. Tá talan er um venjing, fyrireiking og uppfylging, avgerð Veitarin sjálvur arbeiðsstaðin.<br>Møguligt skal vera at fáa fatur í Veitaranum umvegis telefon og telduposti í vanligari arbeiðstíð. |
| **Góðska** | Tað verður væntað, at Veitarin loysir uppgávurnar á einum stigi, sum roknað kann verða við frá einum veitara við tí bakgrund, útbúgving og royndum, ið Veitarin hevur, sambært tilboðnum. |
| **Tímatakstur** | Ráðgevin verður løntur fyri sítt arbeiði sambært tilboðnum. |
| **Tíðarnýtsla og aktivitetir** | Veitarin skrásetur dagliga tímanýtslu og førir sokallaða logbók fyri høvuðsvirksemi.<br>Ráðgevin ger tímanýtslu upp hvønn mánað og sendir kundanum hana, saman við logbók.<br>Ábyrgdarhavandi av sáttmálanum fyri Veitara og Kunda gjøgnumganga og góðkenna tímanýtslu og logbók. |
| **Rokningar** | Veitarin sendir Kundanum rokning eina ferð um mánaðin, har skjalfesting fyri tímar í tíðarskeiðinum er hjáløgd.<br>Treytin fyri útgjaldi er, at krøvini til skráseting av tíðarnýtslu eru lokin, sí omanfyri.<br>Rokningin skal verða talgild, í vanligum oio-xml formati. |
| **Trúnaður** | Báðir partar hava skyldu at viðgera vitan og tilfar um hvønn annan í trúnaði. |
| **Skyldur hjá kunda** | Kundin hevur skyldu at tryggja, at leiðsla og starvsfólk við hóskandi førleika hjálpa til at Veitarin kann loysa tær uppgávur, viðkomandi er settur at loysa.<br>Kundin hevur ábyrgd av at kunna viðkomandi partar og persónar um leiklutin hjá Veitaranum og tær uppgávur, sum avtala er gjørd um. |

| | |
|---|---|
| **Rættindi til tað útinta** | Kundin fær øll rættindi, til tað sum er útint av Veitaranum í sambandi við henda sáttmála, umframt øll rættindi til at broyta og geva og menna víðari tað útinta, soleiðis sum Kundin ynskir tað.<br>Tilfar, sum Kundin hevur útflýggjað Veitaranum, verður latið aftur, í seinasta lagi, tá ið sáttmálin fer úr gildi.<br>Kundin góðtekur at Veitarin kann varðveita upplýsingar og vitan, sum veitarin nýtir at menna egið virksemi, tó soleiðis at hetta ikki brýtur avtaluna um rættindi og trúnað. |
| **At siga sáttmálan upp** | Sáttmálin kann sigast upp av báðum pørtum við skrivligari freist á 1 mánað. |
| **Mishald** | Við týðandi mishald av hesum sáttmála, kann sáttmálin slítast.<br><br>Dømi um týðandi mishald eru um Veitarin:<br>- ikki maktar uppgávurnar<br>- Ikki veitir góðsku sambært tilboðnum<br>- ikki heldur avtalur. |
| **Force majeure** | Vanligar reglur um force majeure eru galdandi fyri henda sáttmála. |
| **Ósemjur** | Tekur ósemja seg upp ímillum partarnar, sum ikki ber til at loysa beinanvegin, skal boðast til samráðingar millum stjórarnar hjá pørtunum.<br><br>Fæst eingin loysn í sátt og semju, verður trætan loyst við vanligum rættarmáli. Føroyskur rættur er galdandi. |
| **Gildistíð** | Sáttmálin kemur í gildi við undirskrift av báðum pørtum og er galdandi fram til og við 31. august 2026. |
| **Optión** | Kundin kann leingja sáttmálan tríggjar ferðir 12 mánaðir (3 x 12). |
| **Uppathald** | Tá sáttmálatíðarskeiðið er runnið, skal Veitarin handa Kundanum alt Kundin eigur rættindi til. |
| **Undirskrift** | Fyri Kundan<br>Navn: Nicolai Mohr Balle Dagfesting: x.x 2025<br><br>Undirskrift: _______________________________________<br><br><br>Fyri Veitaran<br>Navn: xxxxxx Dagfesting: x.x 2025<br><br>Undirskrift: _______________________________________ |